# U19 vann á Newcastle



**U-LANDSLIÐ** Jóan Símun Edmundsson brendi brotsspark fyri Newcastle í dystinum mikudagin, sum føroyska U19-landsliðið vann 2-1

Tróndur Arge

Tað var væntandi, at Newcastle-liðið fór at verða ógvuliga sterkt í mun til tað føroyska, men sum dysturin leið, gjørdist greitt, at føroyska liðið var væl við. Newcastle-spælararnir eru í holt við sína pre-season venjing og tað sást aftur til tíðir. Tað tekur tó einki frá føroyska innsatsinum.

Í fyrra hálvleiki hevði Newcastle meira spæl og í løtum sást munur á liðnum báðum, men sum hálvleikurin gekk, kom føroyska liðið fyri seg. Í seinasta álopinum í fyrra hálvleiki legði Newcastle seg á odda, eftir at føroyska liðið misti bóltin í uppspælinum.

Í seinna hálvleiki kom føroyska liðið veruliga fyri seg og var til tíðir omaná. Mitt í seinna hálvleiki javnaði Gunnar Zachariassen eftir uppspæl frá innskifta Pál Joensen, sum úr vinstru síðu spældi innfyri til Gunnar, sum var leysur og tryggur framman fyri málinum.

## Jóan Símun brendi

Millum mótstøðumenninar var føroyski Newcastle-spælarin, Jóan Símun Edmundsson, og løtu eftir útjavnandi málið gjørdi føroyska verjan brotsspark ímóti Jóan Símuni. Hann varð sjálvur settur at skjóta, men Teitur Gestsson í føroyska málinum bjargaði!

Í seinasta álopinum í dystinum fingu føroyingar hornaspark í høgru síðu. Sørmund Kalsø, sum spældi allan dystin í miðverjuni, var hægstur og stútaði bóltin í kassan til endaliga úrslitið, sum altso gjørdist 2-1 til føroyska U19-landsliðið.

Millum áskoðararnir vóru Newcastle-venjarin, Chris Hughton, og fyrrverandi Liverpool- og Newcastle-spælarin. Peter Beardsley. Á odda fyri Newcastle-liðnum stóð Colin Calderwood, sum á sinni var inni í myndini at gerast føroyskur landsliðsvenjari.

Eftir dystin var Chris Hughton nøgdur við mótstøðuna, frá føroyska U19-liðnum Ábraham Løkin, venjari hjá U19-landsliðnum, var væl nøgdur við føroyska innsatsin og úrslitið. Hann læt eisini væl at umstøðunum og tí sum liðið hevði fingið burtur úr á ferðini í Newcastle.

## Teir yngru taptu

Eisini hini bæði ungdómslandsliðini spældu mikudagin. U17-landsliðið tapti 3-0 fyri Whitley Bay FC, sum er eitt lið uttan fyri Newcastle. Aftur her var stórur munur á likamligu styrkini á liðunum, og onkur av mótstøðuspælarunum mundi helst táttað í tey 20 árini. U17-liðið vísti gott spæl til tíðir og kundi við størri neyvleika havt skorað bæði eitt og tvey mál.

U15-landsliðið tapti 2-0 fyri Wallsend Boys Club, ið hevur fostrað spælarar sum Alan Shearer og Peter Beardsley. Tekniskt stóðu føroyingarnir ikki nógv aftanfyri, men likamliga vóru teir við undirlutan. Til tíðir spældi U15-liðið góðan fótbólt, men hevði trupult við at skapa teir stóru málmøguleikarnar.

*trondur@sosialurin.fo*

# Skrivaðu føroyska hondbóltssøgu í Svøríki




**Hesar vunnu gull fyri Føroyar og Neistan á Partille Cup í Svøríki. Aftast frá vinstru: Matilda Borum Hansson, Lea Reginsdóttir, Marianna Holm Jacobsen, Kristina Heðinsdóttir Clementsen, Jóhild Sørensen, Fríðhild Maria Isaksen Jacobsen, Brynja Sveinsdóttir og Brynja Høj. Fremst frá vinstru: Mona Dam Poulsen, Brynhild Haraldsen, Lilja Mohr, Súsanna Pálsdóttir Nólsoy og Jóhanna Niclassen. Venjarar teirra** *eru Mildrið Jacobsen og Dánjal Pauli Mohr*

*Mynd: neistin.fo*

**HONDBÓLTUR** »Tað mátti henda ein dagin«. Soleiðis tekur ein trúgvur Neista-viðhaldsmaður til, eftir at eitt av gentuliðum teirra gjørdi ikki mætari enn at skriva føroyska hondbóltssøgu við at vinna gullmerki í Partille-cup í Svøríki sunnudagin. Hetta er fyrstu ferð, at nakað føroyskt lið hevur vunnið gullmerki í hesi stóru kappingini

Snorri Brend

Er tað nakað sum tær 13 genturnar á gentuliðnum – gentur 14 ár – hjá Neistanum hava sæð fram til í summar, var tað luttøkan í ársins Partille Cup í farnu viku.

Í samfull tvey ár hava tær vant, bæði summar og vetur, soleiðis at tær kundu verða so væl fyrireikaðar sum gjørligt til hesa luttøkuna. Í teimum var tendraður ein neisti, sum vónandi kundi føra tær heilt upp á sigurspallin.

Undan teimum hava onnur føroysk lið tikið lut, men ongatíð hevur nakað teirra vunnið gullmerki, eins og tað eydnaðist ungu kvinnunum úr Neistanum.

Vónirnar um at koma so langt, vóru kanska ikki av teimum bestu undan kappingini. Har vóru onnur útlendsk lið, ið tey serkønu mettu sum rættiliga sjálvsøgd at vinna sær heiðursmerki – og eisini eitt gullmerki.

Tað skiltist frammanundan, at rukku tær einum plássi í finaluni, so vóru tær nøgdar við tað. Men so hvørt sum kappingin leið, og Neista-genturnar fingu hálað ein stórsigurin fyri og annan í hús, vantaði bert tann seinasti og avgerandi dysturin – finalan móti Hjortshöj Egå IF úr Danmark.

Sum við so mongum øðrum finalum, var her talan um ein sera javnan dyst, har einki varð



avgjørt fyrrenn fá sekund undan dystarloki.

Tíbetur fyri føroysku genturnar fingu tær tað seinasta og avgerandi málið. Og løtu seinni fingu tær heiðursmerki úr gulli og eitt steyp til ognar.

## 12 sekund

Partille Cup er heimsins største ungdómskapping í hondbólti. At vinna eina av kappingunum her, er ikki hvørs mans føri.

Gentur 14 ár hjá Neistanum vóru væl fyrireikaðar, og á vegnum fram móti finaluni vunnu tær á liðum úr so ymiskum londum sum Svøríki, Sveits, Noregi og Nigeria.

Tað vóru tey, sum góvu danska mótstøðuliðinum í finaluni ein góðan møguleika at vinna eisini henda dystin. Men soleiðis varð ikki.

Tað gekk javnt á við dystarbyrjan. Neistin fekk fyrsta málið, men áðrenn tær vistu av, høvdu hinar lagt seg á odda 2-1. Síðani kom Neistin fram um aftur 3-2, og Hjortshöj Egå aftur 4-3.

Beint áðrenn hálvleik vóru føroysku genturnar á odda 5-4, men eitt danskt brotskast javnaði síðani til 5-5. Her var talan um ein javnan og ikki serliga málríkan finaludyst, um ein skal døma eftir fyrra hálvleiki.

Í øðrum hálvleiki gekk soleiðis, at tá 10 minuttir vóru eftir, var Neistin á fyrsta sinni á odda við tveimum málum. Danska liðið fekk ein leikara útvístan, men tær stríddust manniliga, og tá 90 sekund vóru eftir javnaðu tær til 10-10, samstundis sum Neistin nú fekk ein leikara útvístan.

12 sekund áðrenn dystarlok fekk føroyska liðið brotskast, sum endaði í málinum. Soleiðis vunnu Neista-genturnar ta mest jøvnu finaluna í ár við 11 málum ímóti 10.

Samstundis sum tær vunnu hesa finaluna, kundi teir ovurfegnu leikararnir, venjararnir Mildrið Jacobsen og Dánjal Pauli Mohr, og viðhaldsfólk teirra fegnast um, at eitt føroyskt lið á fyrsta sinni hevur vunnið eina finalu í Partille Cup.

Eisini vit í Miðlahúsinum ynskja teimum tillukku við hesum bragdinum.

*snorri@sosialurin.fo*